## Demokratia fegnast

Javnstøðubólkurin Demokratia fegnast um, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava tikið stig til at fáa eina nógvar kvinnur og menn á listarnar hjá flokkunum til næsta løgtingsval. Demokratia vísir á, at formaður Sambandsfloksins hevur sagt, at javnstøða skal verða í flokkinum í seinasta lagi í 2012, og at Eysturoyar Tjóðveldisfelag hevur samtykt at stilla líka nógvar kvinnur og menn upp til løgtingsvalið næsta ár.

## Úr útjaðaranum

Tað er ikki bara í Føroyum, at fólk leita sær úr útjaðaranum. Ein kanning hjá danska blaðnum JydskeVestkysten vísir, at 80 prosent av studentaskúlanæmingunum í Suðurjyllandi ætla sær aðrastaðni, tá tey eru liðug í studentaskúlanum, hóast fleiri hægri útbúgvingartilboð eru í økinum. Tann stóri spurningurin er so, hvussu mong venda heimaftur aftan á lokna útbúgving, og sambært kanningini er tað nógv tann minni parturin.

# KFUM skótarnir úr Runavík sett spakan í til nýtt skótahús

**KFUM skótarnir við Løkin úr Runavík flyta í næstum av Glyvrum út á Mýrarnar. Her verður eitt stásiligt og rúmligt skótahús bygt, ið kann húsa alskyns skótavirksemi. Skótarnir settu sjálvir spakan í á grækarismessu**



*So stásiligt verður nýggja húsið hjá KFUM skótunum við Løkin í Runavík*

*Mynd: Lasse Klein*

SKÓTAVIRKSEMI

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Ein riðil av KFUM skótum marsjeraðu ígjøgnum Runavíkar bý á grækarismessu. Við sær í hondunum høvdu teir spakar. Veðrið skikkaði sær illa; tað var stormur og heglingur, men treystur gekk stóri riðilin serliga mannaður við lítlum skótum út á Mýrarnar. Har varð á stórum skelti eitt stástiligt svart hús við flagtaki avdúkað. Hetta verður tað nýggja skótahúsið í Runavík, og skal tað takast í nýtslu longu næsta ár.

-Vit hava hildið til á ungdóms- og missiónshúsinum á Glyvrum. Og hóast har eru góð høli, so er húsið so nógv umbiði, at vit hava trupult at koma til. Eisini eru vit so nógv í tali nú, at hølini eru við at gerast ov lítil, so vit gleða okkum til at fara inn í hesi stásiligu hølini, sigur Hallur Hansen, ið er bólkráðsleiðari hjá KFUM skótunum við Løkin.

### Øll settu spakan í

Nú komu teir mongu spakarnar, ið skótarnir høvdu hildið fast í hóast kava og regn, til verka. Tí nú kundu øll, sum vildu verða við til at seta spakan í til nýggja og stásiliga húsið, grava ein bøkk upp úr jørðini. Og tað vórðu tað nógv, ið nýttu høvi til. Dúgliga vórðu moldbøkkarnir skumpaðir burtur, og lættir vórðu teir at fáa upp úr vátu jørðini, tí hevði tað ikki kavað henda dagin, so hevði tað regnað. Ein lítil úlvaskóti helt hetta verða sera stuttligt, og hann gleddi seg sera nógv at koma inn í nýggja húsið.

- Hetta hevði eg væl tímað at gjørt hvønn dag. Eg gleði meg ordiliga nógv at sleppa at ganga til skótar her inn, segði drongurin og gravaði dúgliga víðari.

### Nærum alt húsið fíggjað

Grundstykkið, ið skótarnir sjálvir hava fíggjað, er 1867 fermetrar og verður húsið 500 fermetrar. Húsið fer at kosta seks milliónir, og er nærum øll verkætlanin longu fíggjað.

- Vit hava fingið sera stórar peningargávur til húsi. So hava vit eisini sjálvi savnað pening inn, so vit hava sum nú er longu fíggjað nærum alt húsið, sigur Hallur Hansen, bólkaráðsleiðari hjá KFUM skótunum við løkin.

Í húsinum verður millum annað ein stór høll, ið skótarnar gleða seg at taka í nýtslu.

- Her fara vit allarhelst at halda til, tá ið vit skulu hava stór tiltøk. Og vit ætla eisini at lova øðrum framat her, sigur Hallur Hansen.

### Størsti skótabólkur í landinum

KFUM skótarnir við Løkin eru størsti skótabólkur í landinum, og hava tey 130 limir. Umframt limir úr Runavík koma limir frá øllum Skálafjørðinum. Skótabólkurin er frá 1983, og eru tey enn í dag sera aktiv.

- Vit hittast einaferð um vikuna. Har fáast við ymiskt skótatiltøk. Eisini eru vit uttanlands hvørt ár, og luttaka í sokallaðum jamborees. Í ár fara fimm limir hjá okkum til jamboree í Onglandi, sigur Hallur Hansen.

Grundøkið til nýggja skótahúsið liggur tætt við nýggja barnagarðin og Vistarheimið í Runavík, og gongst eftir ætlan, verður húsið tikið í nýstlu um eitt ár.



*Skótarnir settu sjálvir spakan í til nýggja húsið, og hesir báðir hugnaðu sær ófort, hóast tað oysregnaði*

*Mynd: Lasse Klein*